96 ára gomul amerikansk kvinna, sum Hans tosaði við. Hon hevði verið í seks heimspørtum, men nú vildi hon kunna siga, at hon hevði verið í teimum øllum.

## Langt til Suðurpólin

Tað skal tó sigast, at hetta kortini er langt frá Suðurpólinum. Tað er líka langt frá Rudolfo Marsh, sum liggur á 62 st. suður, til Suðurpólin, sum tað er úr Føroyum til Norðpólin!

Antarktika er so ótrúliga stórt. Tað er 13 mill. ferkilometur til víddar, harav er 600.000 ísfrítt. Til sammetingar kann sigast, at Europa er 10 mill. ferkm.

Her er eisini so ótrúliga nógvur ísur. Tað er níggju ferður so nógvur ísur sum við Norðpólin. Ísurin her er í miðal 2000 metur tjúkkur. Tá tað hoyrist um ísflakar, sum eru sum Bornholm, so ger hetta ongan mun. Annars er tann munur á ísflakum her og í Norðuratlantshavi, at í Antarktis eru teir flatir.

Her eru eisini fjøll, sum eru upp til 5.000 m høg.

Her kann vera sera nógvur vindur, javnan er hann 100 m/s. Tað er nógv avfall, fýra ferðir so nógv sum í Danmark.

Tað er nógv lív í havinum, og tí er djóralívið eisini ríkt. Eisini við hvali, og hetta hevur ført nógvar føroyingar á hesar leiðir á hvalaveiðu. Tummas Jacobsen av Skipanesi arbeiddi í 1913/14 á eini hvalastøð í Suður Georgia, sum er á somu leiðum. Tá var hann við til rigga skipið hjá Shackleton til hansara kendu ferð, har hann ætlaði at náa Suðurpólin.

## 5.000 fólk í heilum heimsparti

Men fólkatalið á Antarktis er lítið. Á sumri eru tað eini 5.000, og er hetta mest granskarar. Á vetri er talið lægri. Tað eru 30 lond, sum hava støðir her, og summi av hesum gera krav uppá økið. Eitt av hesum londum er Chile. Hesi lond er tó samd um at samstarva,



Punta Arena, har føroyingarnir búðu, er snøggur, og útsýnið er vakurt



Hans saman við einum sjóelefanti

og um at hernaðarligt virksemi er bannað.

Her er eisini sera kalt. Miðalkuldin er eini 40 kuldastig á sjálvum Suðurpólin, og hægst máldi kuldi hevur verið 88 kuldastig.

Við Rudolfo Marsh er tó ikki



Pingvinir hava tey sæð nógv av

heilt galið. Her er summarhitin 2 hitastig.

Tað, sum fólkini gera, er at fara útferð við smærri bátum, tá ið tey hava lent. Har kunnu tey sigla millum ísflakarnar og síggja kóp og pingvinir.

Sjálvur hevur Hans saman við Luffu og Bergtóru verið ein slíkan túr, men hetta var ikki væl dámt av leiðsluni hjá flogfelaginum. Um nakað hendi teimum, hevði tað sett alt ferðalagið í eina óhepna støðu. Men túrurin er sera áhugaverdur.

Pingvinirnar eru sera spakar, og tað ber til at koma tætt at teimum. Tær kunnu eisini kenna seg tryggar, tí pingvinin er friðað. Tað sama er við kópi, men hann kann eisini bíta frá sær, um hann følir seg gingnan ov nær.

Her eru sjálvsagt onnur kópasløg enn vit kenna til. Eitt av teimum er tann stóri elefantkópurin.

## Tað ber til at fara í kirkju

Á landi er kanska ikki so nógv at síggja. Men kortini er ein lítil ortodoks russisk kirkja beint við flogbreytina, og hana ber til at vitja. Hendan kirkjan verður eisini nýtt at miða seg eftir, tá ið tað verður lent. Her er eisini prestur settur.

Ferðafólkatalið á hvørji ferð hevur verið avmarkað til 50. Hvør bólkur er 20 ferðafólk, so vanliga eru tveir bólkar við. Men væntandi fer hægst loyvda ferðafólkatalið upp í 60, og tá kunnu tríggir bólkar vera við.

Sum í Føroyum er viðhvørt mjørki. Tá ber til at flúgva higar, men tað verður funnið okkurt annað áhugavert ferðamál, sum til eina natúrpark, sum er beint við Puerto Natales.

## Føroyingar ganga undan í Antarktis

Hesar ferðir verða bert gjørdar frá oktober/november fram til apríl, tá ið tað er summar á hesum leiðum. Um veturin verður ikki flogið. Lutvíst er veðrið verri, og ta tíðina er eisini ísur á breytini, sum ger tað vandafult at lenda.

Tað sum ger hesa flúgving so áhugaverda fyri føroyingar er, at hetta er fyrsta sivila jetflogfar, sum flýgur við ferðafólki til Antarktis, og tað við føroyskari manning. Vit kunnu vera errin av at hava fólk, sum kann slóða fyri so langt burtur í heimi!

## Fara í kirkju hvønn sunnudag

Føroyingarnir búgva í Puenta Arenas. Her búgva eini 110.000 fólk. Her er lítið ella einki eftir av upprunafólkinum. Her hava teir hvítu gjørt bart sum so nógvar aðra staðni.

Puenta Arenas er sunnasti stóri býur í Suðuramerika og í øllum heiminum. Hann liggur bert 3-400 kilometur frá Kap Horn. Tað er einki at tosa um í einum so stórum landi.

Her er eitt sindur av fiskarí. Tað mesta er igulker og krabbi, sum tað er rættuliga nógv av.

Fólkið her tykist at liva hampiliga væl. Nógv eru rættuliga trivalig. Hetta kemst kanska av, at tey eta ein stóran døgurða beint áðrenn songartíð, og tað setir seg á rivjabeinini.

Folkið er sera blítt, og summi duga enskt, so tað ber til at samskifta við tey. Føroyingarnir plaga at fara í kirkju og hetta var eisini gjørt. Hetta er eisini nógv øðrvísi enn hjá okkum. Her er eingin felagssangur. Tað eru kór sum syngja. Síðan er tað roykilsi og slíkt eftir katólskum siði. Men tað er áhugavert at síggja nakað sum er øðrvísi.

Tá summarið er liðugt hjá okkum, og tað byrjar at sumrast á sunnara parti av knøttinum, roknar Hans við at fara avstað aftur.

Tá fara vit aftur at hava okkara mann á Suðurpólinum!

Vit takka Hans fyri frásøgnina og vit ynskja honum eydnu í hansara virksemi at umboða Føroyar so væl, sum hann hevur gjørt tað á sínum øki.



Hetta er kirkjan í Roberto Marsh, sum verður nýtt sum ýti við innflúgvingina



Hetta er so býurin Roberto Marsh, sum verður flogið til i Antarktis. Tað er framvegis langt til Suðurpólin.

Sosialurin